

# STØRV Á FRÓÐSKAPARSETRI FØROYA

Á Fróðskaparsetri Føroya eru trý størv leys at søkja
– tvey á Setursskrivstovuni og eitt á Føroyamálsdeildini.

## Fíggjarleiðari til Setursskrivstovuna

Treytað av játtan, verður søkt eftir fíggjarleiðara til Setursskrivstovuna at byrja 1. september 2008 ella skótast til ber.

### Starvið

Fróðskaparsetrið verður í næstum lagt saman við Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum og Læraraskúlanum, og saman við leiðsluni fert tú at skipa fyri hesi samanlegging. Tú fert m.a. at hava um hendi:

- leiðsluráðgeving í fíggjarmálum, lønarmálum og roknskapar málum
- samskifti við Fíggjarmálaráðið
- fíggjarætlanargerð og roknskapargerð
- rakstrareftirlit
- orðing av fíggjarligum mannagongdum

### Førleikar

Vit vænta, at tú hevur:

- viðkomandi prógv frá hægri lærustovni
- leiðsluroyndir á økinum
- evni til at raðfesta og skipa arbeiðið
- góð samstarvsevni
- áhuga í útbúgvingarviðurskiftum
- góðan KT-førleika
- evni at laga teg til broyttar arbeiðsumstøður

### Setanartreytir

Talan er um fulltíðarstarv, ið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

## Skrivstovufólk til Setursskrivstovuna

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Setursskrivstovuna at byrja 1. september 2008 ella skótast til ber.

### Starvið

Í samstarvi við leiðslu og fyrisiting á Fróðskaparsetrinum fert tú m.a. at:

- røkja vanligt skrivstovuhald, eitt nú bókhald, journal, post avgreiðslu o.a.
- standa fyri próvbókini
- dagføra heimasíðuna www.setur.fo

### Førleikar

Vit vænta, at tú hevur:

- skrivstovuútbúgving ella aðra viðkomandi útbúgving
- góðan málkunnleika, serliga í føroyskum
- góðan telduførleika
- áhuga í útbúgvingarviðurskiftum
- góð samstarvsevni og ert fyrikomandi
- sjálvstøðugt og málsøkið arbeiðslag
- evni at laga teg til broyttar arbeiðsumstøður

### Setanartreytir

Talan er um fulltíðarstarv, ið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið, 3. flokkur.

**Umsóknir**
Umsóknir til størvini á Setursskrivstovuni skulu við avritum av prógvum, ævisøgu (CV) og viðkomandi skjølum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 20. juni 2008. Sendið umsóknir til:

**Setursskrivstovan**
**Fróðskaparsetur Føroya**
**Postrúm 272**
**FO-110 Tórshavn**

**Fleiri upplýsingar**
Fleiri upplýsingar um størvini á Setursskrivstovuni fáast við at venda sær til Rúnu Hjelm, setursskrivara, tlf. 35 25 00, runah@setur.fo, ella Winny í Pætursastovu, varasetursskrivara, tlf. 35 25 00, winny@setur.fo.

## Skrivstovufólk til Føroyamálsdeildina

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Føroyamálsdeildina á Fróðskaparsetrinum at byrja 15. august 2008 ella skótast til ber.

### Starvið

Starvsøki títt verður:

- samskifti við studentar og lærarar
- skeiðsskráseting
- kassi og kassauppgerðir
- vanligt skrivstovuarbeiði

### Førleikar

Vit vænta, at tú:

- hevur skrivstovuútbúgving ella tilsvarandi royndir
- dugir væl føroyskt og nakað av norðurlendskum og enskum
- arbeiðir sjálvstøðugt
- sýnir ábyrgd og røkjuskap
- dugir væl at samskifta og samstarva við onnur
- hevur góðan teldukunnleika

### Setanartreytir

Talan er um ¾ starv, ið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið, 3. flokkur.

**Umsóknir**
Umsóknir til starvið á Føroyamálsdeildini skulu við avritum av prógvum, ævisøgu (CV) og viðkomandi skjølum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 20. juni 2008. Sendið umsóknir til:

**Føroyamálsdeildin**
**Fróðskaparsetur Føroya**
**Postrúm 272**
**FO-110 Tórshavn**

**Fleiri upplýsingar**
Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Sáru Joensen, deildarskrivara, tlf. 35 25 20, saraj@setur.fo.

**Fróðskaparsetur Føroya**
**www.setur.fo**

SENDISTOVAN